gult cyan magenta svart



VIÐMERKINGAR

## Fólka-atkvøðan



**Lisbeth L. Petersen**
*løgtingslimur*

Nú so nógv verður tosað um fólkaatkvøðu og opinleika, hoyra vit samgonguna upp í saman og umaftur og umaftur brúka orðingar sum ”fólkið skal vita nágreiniliga, hvat tað snýr seg um…” og ”tað er Føroya fólk, sum skal taka støðu…”, meðan tað, sum veruliga hendir, er hitt øvugta.

Fólkið veit hvørki hvat atkvøðan fer at snúgva seg um, ella hvat samgongan er samd um, tí signalini eru so ymisk, og landsstýrisfólkini vevja seg í mótsagnir, so tað forslær.

Tann sum skeitir í faldarin, sum landsstýrið sendi í hvørt hús (skattgjaldarin hevur goldið!) kann lesa á aftastu síðu, har spurningar og svar eru sett upp:
Spurningur: Hví strembar landsstýrið ikki eftir at vit gerast fíggjarliga sjálvbjargin áðrenn vit gerast politiskt sjálvbjargin? Eiga vit ikki fyrst og fremst at vísa í verki, at vit klára okkum uttan danskan stuðul?

Svar: Landsstýrið hevur ta fatan, at politisk ábyrgd og búskaparlig ábyrgd hoyra saman. At vit taka búskaparliga ábyrgd er ein fylgja av, at vit taka politiska ábyrgd – og øvugt. Landsstýrið heldur tað ikki vera rætt, at føroyingar taka fíggjarligu ábyrgdina av Føroyum, men lata ta politisku ábyrgdina og tað politiska valdið verða verandi í Danmark.

Hvussu samsvarar hetta við tað, vit nú hoyra frá teim trimum floksleiðarunum?

Tjóðveldisformaðurin sigur ofta, at andstøðan brúkar ræðumyndir, men her er sanniliga nakað at ræðast. Orðingin á sinni hjá fyrsta tjóðveldisformanninum ”lirka og lumpa” er nú sera aktuel, tað hava vit nú talandi dømi um!

VIÐMERKINGAR

# Betongtungur bjálki av ósakligheit

**Atli Dam**



Høgni Hoydal eftirlýsir einum farra av sakligheit í orðaskifti við Atla Dam. Well hann hevur so kanska funnið ikki farran, men flísina í Atla eyga. Og flísina duga vit menniskju sambært halgubók at síggja meira ella minni hjá øðrum, men samstundis kunnu vit ganga við einum bjálka í egnum eyga, sum vit ongantíð varnast.

Hvat sakligheit og sannføri viðvíkur gongur Høgni við einum so betongtungum bjálka í eygunum, at hann nærum forðar øllum útsýni til øki, sum ikki hava júst við loysing og fullveldi at gera.

Høgni Hoydal skal vita, at uttan mun til hansara uppástand, metir Atli Dam seg framvegis hava ein virðismiklan politiskan førning at bera, og trúgv uppá tað hann hevur staðið fyri í politikki.

Mær tørvar ikki lygn og persónliga útspilling til tess at undirbyggja mína meining, eg eri framvegis púra kaldur yvirfyri bukkuspannum, sum eg havi fingið oman yvir meg í túsundatali í mínum politiska lívi. Men eg vil sanniliga hava møguleika og rætt til at siga, at eg haldi menn siga ósatt, tá eg haldi at so er, men samstundis vil eg framhaldandi royna at liva upp til eitt umdømi, sum sigur, at orð Atla kann ein líta á, at ein avtala vð Atla heldur o.s.fr., alt slíkt, sum Høgni kann spyrja eldri politikarar um, eisini í tjóðveldisflokkinum. Men her hugsi eg sjálvsagt ikki um Hergeir Nielsen.

Petur Mohr Dam segði altíð, at lygnum er ómøguligt at halda bókhald yvir, tí skal ein halda seg til sannleikan. Men hetta gert tú sjálvandi ikki longur enn tú ert sanførdur um hvat er satt og ósatt, tí er ein farri av subjektivi í øllum tú sigur.

At analysera og sundurgreina postulátini í eftirlýsing Høgna Hoydals loysir seg ikki, men fari eg niðanfyri, at lista nakrar úrskurðir, sum siga meira um bjálkan hjá Høgna enn um manglandi farran hjá Atla:

1. Havi enn onga grein ella lesarabræv móti Høgna sæð, sum hann ikki hevur heft orðið ”ósakligt” uppá.
   Er ein ósamdur við Høgna Hoydal, er ein sjálvandi ósakligur. Tað var jú eisini tað sum Marianne Jelved avdúkaði, tá hon spurdi, um tað, at ein var ósamdur við Høgna Hoydal, var tað sama sum at vera ”óseriøsur”.
2. Høgni Hoydal sigur meg vilja at Føroyar skulu verða partur av danska ríkinum. Tað er rætt, at eg mæli til ríkisfelagsskap ímillum tríggjar javnbjóðis tjóðir og lond. Eg eri samdur við Frederik Harhoff í, at Danmark reelt ikki longur er eitt eindarríki, men er trýbýtt. Og tað hevur longi verið so, í minsta lagi síðan onkuntíð í sjeytiárinum. Men yvirtøkan av undirgrundini staðfestir hetta betri enn nakað annað. Tað sum pínir er væl júst hetta, tí tað torpederar delegationsteoriina við afturtøkumøguleika, sum hevur verið politiska bíblia tjóðveldismanna. Sjálvsagt eru formellir trupuleikar av ósamsvari við grundlóg og valdandi statsrættarteori. Men tað er jú besta dømi um samráðingarvilja dana, at Poul Nyrup segði ”ja men det er jo det vi nu skal finde ud af”. Grundlógir broytast og stats – og fólkarættarlig teori førkar seg hvønn dag sum gongur. Hesi 12 donsku orð hava allir føroyingar hoyrt, men samráðingarmenn landsstýrisins royna at dylja tey sum mannsmorð.
   Høgni leggur mær í hug og munn, at vit skulu lata ábyrgdina og alt vald frá okkum. Tað havi eg ongantíð sagt. Er hetta dømi um Hoydalska sakligheit?
3. Vit mála ”ræðumyndir”, vil Høgni vera við. Nei, ræðumyndirnar hevur Høgni sjálvur goldið fyri við teim 20-tals milliónum, hann ”hensynsleyst” hevur nýtt til fullveldispropagandu. Tað er Hvítabók, sum setir ljóskastaran á, at búskaparliga hongur tað ikki saman at taka eina milliard burturúr fíggjarlógini og so vænta, at bert ein milliard skal koma í samlaða búskaparvøksturin í staðin. Seinast var tað loysingarmaðurin Hermann Oskarson, sum tægaði hettar sundur á fundinum hjá ”Hesuferð”.
4. Eg havi ikki umtalað fullveldisfólk sum serligar verur. Men, slík sum vilja kvetta, kubba, øsa og skapa illvild mótvegis dønum, sum onki hava við hetta at gera, sært tú hvønn dag gera vart við seg í bløðunum. Havi heldur ongan skýrt kommunist ella fasist í mínari viðmerking. Men hetta er kanska Hoydalsk sakligheit?
   Men nú tú rør uppundir fortíð, so skal eg viðganga, at eg havi hugsað um hetta. Eg havi ta fatan, at títt jørildi var ikki demokratiskt, hóast tú so dúgliga talar um fult demokratiska tilgongd o.s.fr. Havi eisini hugsa um, at tín útbúgving m.a. snýr seg um, hvussu ein við gjørdum hendingarøðum kann draga ymisk samfelagsviðurskifti fram úr loynidómi, og tá tú so nýtir hetta til at tilræna tær ”definitións”-rættin til, hvat hugtøkini merkja, so sum eg fyrr havi víst á, ja so standa vit yvir fyri nøkrum spildur nýggjum.
   Havi júst ikki viljað verið so óflýggjaligur, at eg bólkaði hetta í gomul hugtøk um fasismu, kommunismu, maoismu, skipan av politiskum ”cellum” ella slíkum, men havi fyri meg sjálvan skapt eina definitión, sum er, at vit hava fingið eitt Høgnakrati afturat allari teirri gomlu barlastini.
5. Um bankamálið er at siga, at heimastýrisskipanin skramlaði ikki orsaka av tí. Tað avdúkaði veikleikar, sum eg ofta hevði víst á áðrenn skrædlið. At vit ikki fingu landsbanka, at ómøguligt var at burturbeina rentuspekulatiónina (samstundis sum Hergeir Nielsen skýrdi meg bankarænara), at vit ikki fingu lut í somu vitan sum Fíggjareftirlitið og mangt annað, eru dømi um viðurskifti, sum kravdu broyting, men tað er ósakligt at krevja alla Heimastýrisskipanina avtikna av hesum grundum.
   Nú hava tit skjótt gingið fýra ár í politiskari oyðimørk, har allur samfelagsútviklingurin liggur á láni, tit gjalda loysigjald til verunligar politiskar rænarar og sjórænarar, men ikki so mikið sum Fíggjareftirlitið er komið upp á pláss.
   Eg havi ætlanir um at koma umaftur í 80’ini, men hvørt heilsan ella árini verða til tess, veit eingin. Men eydnast tað, so kann sláast fast, at ein orsøk var, at millum annað 20 til 22% av veljarunum nýttu sína atkvøðu til eitt politiskt ”konglomorat”, sum tjóðveldispolitikkur altíð var og framvegis er. Har bert loysingin savnar. Ja, hatta var sjálvmótsigandi: Loysingin savnar.
6. Eg havi ikki sagt, at landsstýrið hevur víst frá sær ráðgeving i fullveldismálinum, men hjálp til at røkka upplýsingar frá ST. Er her ein viljað snaring? Ella er hetta aftur dømi um Hoydalska sakligheit?
   Verunleikin er, at tilboðið ikki kundi nýtast politiskt og kanska tí ikki hevði áhuga. Lat hetta vera eina insinuatión, um tú vilt. So er tað flísin í eyga mínum, men tú kanst sum journalistur nokta at almannakunngera keldur, tað einasta, sum tá hendir, er at „bjálkin“ tyngist enn meira.
7. Tú ynskir orðaskifti um royndirnar av Heimastýrisskipanini, hvat vit læra av teim, og gangi eg út frá, hvussu vit fara víðari. Tað er í lagi, um tú verunliga vilt tað. Men so má eg eisini krevja, at tú setir teg inn í tað hugsjónarliga og filosofiska støði, sum vit byggja okkara uppástand á um, at tú røkkur størri frælsi og verunligum sjálvsavgerðarrætti í samvinnu, enn tú kanst røkka sum lítil suverenur státur, kroystur av allari teirri máttugu verð uttanum okkum.
   Havi skrivað rættiliga nógv um hetta ideologiska grundarlag. Trúði tú kendi tað. Tí undraði tað meg, at tit so arrogant tóku tær tríggjar apurnar í favn, sum symbolisera, at eg hoyri onki, eg síggi onki og sigi onki, tá uppskotið um eina sjálvstýrislóg kom til viðgerðar í tinginum í august 1999.

Tit virdu ikki uppskotinum viðgerð, framsøgumaðurin skýrdi tað ein sjúkan nátaunga, sum ongin troystaði sær at taka inn í bátin, hóast einasti fuglur eg tá kundi koma í tankar um var allikan, tí maðurin var, sum danir siga ”så f... som en allike”.

Tú hevur sum ”hurtigsnakkari”smogið tær undan, við at látast sum tú ikki skilti sjálvstýrisuppskotið aðru hvørja ferð, og aðruhvørja ferð at siga, at sjálvstýrisuppskotið hjá Javnaðarflokkinum var tað sama sum fullveldisuppskot samgongunnar. Tú visti væl, at loysing/ikki loysing er ein aðalmunur.

Enn einaferð Hoydalsk sakligheit?

### Hvussu fáa vit ábyrgdarfullar politikarar?

Høgni Hoydal hevur óteljandi ferðir ført fram, at ”loysing” ella ”frælsi” tryggjar okkum móti kreppum, skaptum av ábyrgdarleysum politikarum.

Dømini eru mong úr t.d. Afrika, at ongantíð gjørdist ábyrgdarloysið størri enn aftaná at londini fingu sokallað ”frælsi”, tí er tað ósakligt at billa fólki inn, at loysing tryggjar Føroyum ábyrdgarfullar politikarar.

Men tað er helst eisini ósakligt at nýta lond í Afriku til samanberingar, hóast Hvítabók ger tað.

Tað vit higartil hava fingið, er einaferð afturat politikarar, eitt nú Høgna Hoydal, sum eru til reiðar at klúgva føroysku tjóðina úr skalla í hæl við bert 1 atkvøðu í meiriluta. Tað er ikki ábyrgdarfult, men Høgnakratiskt.

Hetta málið skal loysast av _ av løgtinginum við ikki minni enn _ av fólkinum aftanfyri seg.

Longu nú fer ein óhugnaligur hatursgjóstur yvir landið. So haturskent tjak hava vit ikki sæð síðani 1945-48, fyrr enn nú meiningakanning var kunngjørd herfyri.

Hygg bara í gjár at spræningini, sum Sjúrður Skaale sendir, tann fitti maður hann var og vónandi aftur blívur.

gult cyan magenta svart



VIÐMERKINGAR

# Neyðtøka av fólkaatkvøðun

**Mannbjørn Jacobsen**
*19.febr.2001*

Við seinastu samráðing millum føroyska landstýri og P. Nyrup Rasmussen, eru danskar búskaparhøttanir, fyrr havdar í eyka, nú beinleiðis tiknar inn í politisku uppgerðina millum fullveldissíðuna og sambandssíðuna.

Hetta er óloyvt eftir ST samtykt um fólkaatkvøður av slíkum slag, tjóðskaparligu stjórmála støðuna, so føroyingar áttu at umhugsa luttøku. Betur er at svara aftur á rættan hátt 26. mei, so hesin danski hógvurin verður hin seinasti av nógvum av hesum slag.

Av tíðindum frá fundingini skilst, at danir standa uppá 4 ára skiftistíð, sum tó ikki neyðugt verður so. Danir eru bundnir altjóða, at stuðla fyrrverandi hjáland uppá rættkjøl, um neyðugt.

Føroyingar eiga í samband við atkvøðuna at taka upp samband við ST, so reiðiliga fer fram, ongar høttanir, og skiftistíðin verður sámilig, uttan óneyðigar búskapar og umsitingar niðurleggjandi eftirfylgjur.

Hetta er í øllum londum í somu støðu í dag.

Eisini eiga føroyingar at skapa altjóða áhuga um atkvøðuna og serliga trupulleikarnar henni umkring, tí øll sannroynd vísir at danir er erkvisnir um altjóða umdømi og týdningarmikil lutur í sambandsháttinum, at niðurgera møguleikan hjá føroyingum, at vinna somu rættindi sum td. danir, er láturliggering, lítisverdgering og serliga burturgloyming og smálandsluta (lokaliserings) gering av málinum, sum so fyri fyrstu ferð og við gott høvi slepst undan.

### Ikki mótføroyskur

Nyrup er ikki egin her. Hann er neyvan mótføroyskur. Er undir trýsti frá afturhaldsbólkum í Danmark, við halahangi í Føroyum, sum tryggja skulu afturhalds trúvirðið í uttanríkisspurningum, her uppí kemur føroyska stjórnmálamálið, á røttum stað, so tað fær eitt framburðshugað snið.

Tað hevur tað ikki hjá konservativu.

At báðar síður í donskum politikki standa aftanfyri hetta útspæl til føroysku atkvøðuna sæst av orðunum frá M.Fogh Rasmussen fyri Vinstra beint aftaná” ...færøsk kanonbådsdiplomati”.

Nógv nýtt er heldur ikki í hesum, tí tað var støðan hjá donsku stjórnini áðrenn samráðingina. Danir meta helst føroyska atkvøðuna sum roynd hjá landstýrinum, at halda fast við sítt uppskot um skiftistíð.

Eins og lagnuárið 1946 eru somu fólkabólkar frammi í Føroyum, hjálptir av illa goymdu donsku sambandsvinum sínum, við høttanum um vælferðarskrædl, danskan hernað. Í øðrum londum í somu lagnustund høvdu hesi umhugsa gisting á sendistovum. Í Føroyum sleppa hesi, tryggja í føstum størvum, væl frá at flenna burtur møguleikar okkara sum tjóð uttan hjálpt av donskum mutri. Støðan er óneyðuga so, tí at sambandsflokkarnar higartil hava nokta at luttaka i at yvirtaka td. gjaldslutin í skúlaverkinum við sama próvgrundsmøguleika í hyggju.

Vandamiklari er støðan, allan nýggjara skúlaútbúgvingina havdan í huga, sum enn í flestu førum beinleiðis hevur bústað í Danmark fyri eyga í fleiri ár, er ikki serliga akademisk longur, orsakað av tilknýti okkara til Danmark og trupuleikar teirra, sum td. setur luttøku í donskum hernaðarávintýrum í sundurliðaðum londum, antin áðrenn ella aftaná aftur, í møguleika sum atgongumerki á víðari lívleið.

### Kann fíggjast á annan hátt

Óneyðugt er at nakar fyri føroyingar ávísiligur niðurskurður verður í livistøðinum, tí at fíggingin, sum serliga ávísir føroyingar merkja, fellur burtur.

Hetta vinnulívsavlagandi, kreppuframkallandi fremmandalikam, er óvanligt og ikki til í øðrum londum - ES studulin til landbúnaðin er útjavning millum lond í frælsari kapping - , kann sjálvandi skipast á annan hátt.

Ikki kann trupuleikin við fígging kveistrast burtur í fyrstu atløgu. Ætlanin er at føroyingar skulu steðga upp her. Niðurskurðurin uppá 4 ár er ikki so stórur býttur út á øki, írestandi 11 árini av 15 ára skeiðnum í ætlanini hjá landstýrinum, kostar 15 milliónir árliga, kunnu klárast við lánum.

Meiri enn tað verður lánt millum ár og dag til Føroya. Skatturin hjá okkum kundi lagast betur til vanlig skandinaviskt viðurskifti um ikki heilt. Stór lína er her enn við tí betru tænastum tað ma. gevur.

Hægri skattur á stóru fiskimannalønirnar kundi verið settur saman við skipaðari frítið til veruligan sosialan góða - veruliga merkt vælferð -, heim, tíð til tað.

Hetta merkir ikki vælferðar niðurskurð fyri samfelagið, men umskiping og gott brúk av vælferðini.

### Sanni trupuleikin

Sanni trupuleikin komandi árini, við Noregi í huga, er ikki lækkandi vælferð, minni lønir, men øvugt vandi fyri yvirupphiting av búskapinum av lættvunnum peningi, óvanligt fyri føroyingar. Avskiping av einum undirbrotligum banantjóðveldi fyri eitt blaktrandi banantjóðveldi.

Gerst oljuvinna veruleiki er sjálvandi ikki stórir trupuleikar í at halda í hvussu so er somu vælferð við fullveldi, mett í reiðum peningi.

Trupuleikarnir verða vælferðarsjúkur, sum heilsuskaðiligur livimáti, rúsevnismissnýtsla, heimupploysing, altjóðagering í ringum týdningi.

Besti máti at loysa hetta er sjálvir at ráða. Uppgeva láturliga fáfongd og skipa veruliga sjálvvirðandi tjóðveldi.

## Føroya Postfelag havt aðalfund

TÍÐINDASKRIV
*Føroya Postfelag*

Føroya Postfelag, hevði aðalfund leygardagin 17. februar.

Nógvir limir vórðu á aðalfundi, har aktuella støðan varð viðgjørd.

Niðurstøðan var, at sáttmálasamráðingar nar helst verða harðar, har dentur verður lagdur á styttri arbeiðsviku, og longri summarfrí, eins fleir punkt eru um sáttmála-ábøtur.

Sjálvandi er eisini krav um munandi lønarhækking.

Kjak varð eisini um nýggja lógaruppskotið um »postvirksemislóg«, og varð nevndin biðin um at hava eitt vakið eyga við, hvat hendir á økinum.

Eftir at nevndin hevur skipað seg, sær hon soleiðis út.

Sunleiv Højgaard, formaður. Agnar Bech, næstformaður. Hendrik Thomen, Kassameistari. Elin Danielsen og Jákup Páll Mohr Mortensen

# Hatten af for Schlüter

**Absalon Absalonsen**
*100 Tórshavn*

De fleste danske politikere er i disse dage forfærdede , nærmest bitre, over at fhv.statsminister Poul Schlüter afgav rettighederne til råstofferne i den færøske undergrund til færingerne, begivenheden betegnes ligefrem i danske aviser for en skandale.

Men her på Færøerne har de fleste af os en helt anden opfattelse, hvem skulle ellers have fået retten til disse råstoffer. Færingerne beholdt retten til fiskerettighederne i færøske farvande mens EF løb afsted med retten til de danske fisk. Shetlandsøerne og Orkneyøerne blev i sin tid foræret til England, deres sprog og deres kultur forsvandt, men handlingen forbliver en skamplet på Danmarks historie.

Poul Schlüther har været i stand til at gennemskue, at om retfærdigheden skal ske, så er der ingen uden færingerne, der ejer retten til den færøske undergrund, hvem ellers ???

Det lyder fantastisk, at man nu siger, at råstoffer i undergrunden ikke kan gives til en bestemt lokalbefolkning i en del af riget, fordi disse råstoffer tilhører hele riget, det man i virkeligheden mener, er vel, at kolonimagten aldrig kan forestille sig, at man skulle afgive råstofferne til de indfødte på Grønland og Færøerne, for hvis man er så enestående demokratisk, at man mener noget med de fagre ord om, at undergrunden er fælles ejendom for alle dele af kongeriget, hvorfor har man så ikke kaldt de penge, man overfører fra statskassen til henholdsvis den grønlandske og den færøske landskasse for en rimelig, retfærdig og selvfølgelig andel, der tilkommer disse landsdele, af den danske stats olie og gasindtægter fra Nordsøen.

Nej man kalder det “bloktilskud”, og man gør sig, specielt i disse dage, stor ulejlighed for at disse overførsler skal opfattes som koloniherrernes allernådigste almisse til de stakkels indfødte grønlændere og færinger, der aldrig nogensinde må få lov til at klare sig selv.

Tiden var moden, sagde Schlüter. Det var for ham at sætte punktum for tiden med koloniherrer og indfødte. Det går, som bekendt, ikke an både at blæse og have mel i munden. Er råstoffer i undergrunden fælles eje, så burde den danske regering i mange år haft betalt Grønland og Færøerne deres andel af indtægter fra den danske undergrund, så var der nok for mange år siden blevet unødvendigt med det såkaldte bloktilskud.

Selv små børn har så megen retfærdighedssans, at de forstår, at hvis Danmark skal gøre krav på Færøernes olierigdomme, så burde danskerne for længst have tilbudt at dele nordsøolie og gas med Færingerne.

Men der var, Gud ske lov, én dansker, der så logikken og havde så megen respekt for demokrati og retfærdighed, at hann turde gøre det eneste rigtige, og som sådan vil han blive husket langt langt frem i tiden.

Hatten af for Schlüter, hans retfærdighedssans, hans demokratiske indstilling og hans handlekraft.

Det er en skam, at den nuværende statsminister gør alt hvad han kan for at forværre forholdene mellem danskere og færinger og afviser færingernes forslag om gradvis at overtage det fulde økomomiske og admimistrarive ansvar for deres land og dets indbyggere, dog med et specielt nært forhold til Danmark, idet man fra færøsk side foreslår fælles kongehus, fælles mønt, gensidige rettigheder o.s.v.

Men Poul Nyrup Rasmussen siger NEJ, for ham er det efter manges opfattelse et spørgsmål om magt. Så længe Danmark har suveræniteten, kan alt lade sig gøre, men så snart man fra færøsk side taler om ligestillede parter, så skal vi smides ud .Men derved afskriver man sandsynligvis danskernes mulighed til samme rettigheder som færinger i det kommende Nordatlantiske “Quwait”, og , hvem ved ?, måske et betydeligt bloktilskud, der ville gå den modsatte vej af i dag. I så fald vil dette gå over i historien som en langt større fadæse end den, man i dag klandrer Poul Schlüter for.

Er der virkelig ingen ansvarlig dansk politiker, der har åbne øjne og er i stand til at se, hvad der er ved at ske. Færingerne har fået retten til deres egen undergrund , det er vel kun naturligt, og de vil beholde den, selv om det så skal koste den århundred lange samhørighed med Danmark.

Mon ikke Danmark burde overveje ganske nøje, om det alligevel ikke er bedst for alle parter, at man accepterer det færøske landstyres forslag om de fremtidige statsretslige forhold mellem de to lande som værdige ligestillede parter i en eller anden form for (rigers) fællesskab ???

Lad os håbe og bede til, at vi oplever en værdig udgang af den opståede situation.